# Hjálp til dement og avvarðandi

**At veita umsorgan til persónar við demens krevur bæði serliga fakliga vitan og empati. Kring landið búgva og virka 40 demenssamskiparar**

HEILSUMÁL
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Kring alt landið virka 40 útbúnir demenssamskiparar. Her heima skipaði Alzheimerfelagið fyri tí fyrstu og harðliga tiltrongdu útbúgvingini av demenssamskiparum í 2004.

- Hetta er sama útbúgving, sum niðri. Hon er bygt upp í modulir og fingu vit lærarar frá danska skúlanum heim at undirvísa, sigur Erna Háberg.

Árið eftir skipaði Tórshavnar Kommuna fyri einum skeiði afturat, so at nú eru umleið 40 útbúnir demenssamskiparar, sum búgva og virka kring alt landið. Frammanundan høvdu tríggjar sjúkrasystrar verið niðri og fingið sær hesa útbúgving, sum er ætlað øllum sløgum av røktarstarvsfólki, sum arbeiða innan demensøkið.

## Skipað nevnd

Erna Háberg, demenssamskipari, sigur, at føroyskir demenssamskiparar hava sett felag á stovn, FD. Hetta er felag fyri fólk við demensútbúgving og fólk, sum hava eitt serligt tilknýti til arbeiði við demens.

- Hóast vit nú hava nógvar samskiparar kring landið, so er enn eitt petti eftir á mál, til at fáa eitt rættiligt tilboð skipa til sjúklingar og avvarðandi. Hetta kundu vit hugsað okkum at fingið í lag samstarv við kommunurnar um, tí vit eru støðd í øllum teimum stóru oyggjunum í landinum, sigur Erna Háberg. Hon vónar at fólk íframtíðini, fara at kunna fáa fatur á einum demenssamskipara, hava tey brúk fyri ráðgeving ella hjálp um demens.

- Endamálið við felagnum er eisini at betra um góðskuna í umsorganini hjá fólki, sum eru rakt av sjúkuni demens. Tað verið seg at stuðla og vegleiða teimum, ið rakt eru og teirra avvarðandi. Harumframt er endamálið, at stimbra og menna starvsfólkini, sum eru um sjúklingarnar, sigur Erna Háberg.

Eisini vil felagið royna at ávirka myndugleikarnar, so menningin innan demens kemur á hædd við hana í londunum kring okkum.

Í nevndini í felagnum eru Reidun Magnussen, Leynar, forkvinna, Poula Sørensen, Havn, skrivari og Poula Debes, Havn, peningarøkil.

## Demenslinjan er opin

Tað ber altíð til at ringja til demenslinjuna hjá Alzheimersfelagnum týskvøld frá 18-20, har øll eru vælkomin at venda seg. Erna Háberg sigur, at fólk kunnu vera anonym tá tey ringja til linjuna, sum hevur telefon 318102.

**Altjóða alzheimerdagur 21. september**



## Ert tú dement?
### 10 tekin

- **Minnið viknar, so tað ávirkar arbeiðsavrikið. Men tað ikki óvanligt at gloyma uppgávur av og á – og so at minnast aftur seinni. Fólk við minnissvinni gloyma oftari og minnast ikki aftur seinni.**
- **Tú hevur ilt við at greiða vanligar gerandisuppgávur. Fólk við minnissvinni kunnu matgera, men gloyma at seta matin á borðið, ella at tey yvirhøvur hava gjørt mat.**
- **Máltrupulleikar. Fólk við minnissvinni gloyma heilt einføld orð og seta onnur orð í staðin, so tað, sum tey siga, verður óskiljandi.**
- **Gloyma tíð og stað. Fólk við minnissvinni kunnu villast uttanfyri hjá sær sjálvum, og tey vita ikki, hvat tey gera har ella finna ikki heimaftur.**
- **Lítið og einki skyn. Fólk við minnissvinni kunnu heilt gloyma, at eitt barn er inni – og hvør eigur barnið. Tey kunnu eisini lata seg í vetrarklæði á sumri ella lata seg í fleiri húgvur uttan á hvørja aðra.**
- **Ilt við at hugsa í myndum. Fólk við minnissvinni gloyma viðhvørt tølini og hvussu tey kunnu nýtast.**
- **Gloyma lutir. Fólk við sinnissvinni kunnu leggja strúkijarnið í frystaran ella seta sukurskálina í kustaskápið.**
- **Skiftandi hýrur og atburður. Fólk við minnissvinni kunnu gerast í ringum hýri eftir einum lítlum bili og vit vita ikki hví.**
- **Lyndisbroytingar. Fólk við minnissvinni kunnu broytast sera nógv, og gerast óð og ørkymlaði.**
- **Tvørrandi virkishugur. Fólk við minnissvinni kunnu gerast rættiliga óvirkin, og tey skulu stimbrast, eggjast og stuðlast í næstan øllum.**

**Við aldrinum kann tað henda, at vit stúra óneyðuga nógv fyri, um okkum bagir eitt hvørt í heilanum, tí vit hava ilt við at minnast, sum vit plagdu. Tíbetur er í flestu førum talan um fyribils minnissvinn, ið kann koma av strongd, ringum svøvni, trupulleikum ella øðrum.**
**Hjá summum verður minnissvinnið varandi. Tí hevur Alzheimerfelagið givið út faldaran um 10 tey vanligastu eyðkennini um minnissvinn, har Alzheimers er sjúka tann vanligasta.**

# Demenskvøld í Miðlahúsinum

**Mánakvøldið 24. september kl. 19.30 skipar Alzheimerfelagið fyri evniskvøldi um samspælið millum avvarðandi hjá demenssjúkum og starvsfólk innan heilsuverkið. Evnið verður: Tá ið demens gerst partur av gerandisdegnum**

HEILSUMÁL
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Í sambandi við, at altjóða alzheimerdagur er í dag, 21. september, skipar Alzheimerfelagið fyri fyrilestri í Miðlahúsinum mánakvøldið.

Í tíðindaskrivi frá felagnum verður sagt, at fyrilesturin fer at snúgva seg um, at tá ið ein av okkara næstu verður raktur av demens, rakar sjúkan øll og alt broytist. Gerandisdagurin gerst truplari, og leiklutur og uppgávur okkara broytast. Krøv til maka, børn og næstringar vaksa. Í tílíkum føri eru vitan, stuðul, vegleiðing og góð ráð týðandi partur fyri at lætta um gerandisdagin. Góða samspælið millum starvsfólk og næstringar gerst fyritreytin fyri trivnaðinum hjá sjúklinginum.

Fyri avvarðandi er støðið fyri samstarv øðrvísi enn fyri starvsfólkini. Talan er um tvær sera ymiskar støður. Hvønn týdning hevur tað fyri samspælið millum starvsfólk og avvarðandi?

Hvussu er leikluturin sum avvarðandi, sæddur við teirra eygum og sæddur við eygunum hjá starvsfólkunum. Samsvar og frábrigdi, ið eru treyt fyri góðum samstarvi.

## Demens-kanón talar

Fyrilestrarhaldari er Birgitte Vølund, ið er sjálvstøðugur sjúkrarøktarfrøðingur og master í gerontologi. Fyrilesturin er tikin úr einari 3-ára langari verkætlan um avvarðandi at veikum eldri. Tey seinastu 25 árini hevur hon arbeitt innan eldrarøkt og verið við til at menna demensøkið. Hon arbeiðir nú sum sjálvstøðugur eldraráðgevi. Birgitte hevur ábyrgdina av útbúgvingini av demenssamskiparum í Danmark og arbeiðir haraftrat við umsorgan og gerandislívi hjá gomlum á røktarheimum og teirra avvarðandi. Birgitte hevur verið í Føroyum fleiri ferðir í sambandi við útbúgving og ráðgeving innan eldaøkið.

Alzheimerfelagið sigur, at eftir fyrilesturin er kjak á skránni, og at øll eru vælkomin.